# Vit skulu hava ES-limaskap við undantøkum

**- Eg eri til reiðar at samstarva við landsstýrið um at finna loysnir fyri Føroyar viðvíkjandi tilknýti til ES-limaskapin, sigur Edmund Joensen. Høgni Hoydal, uttanríkisráðharri, er ósamdur**

MARKNAÐAR-ATGONGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Høgni Hoydal, uttanríkisráðharri, og Edmund Joensen, fólkatingsmaður, eru ikki samdir um, hvussu farast skal fram viðvíkjandi tilknýti Føroya til ES*

- Føroyar hava líka síðani 1973 kunnað blivið limur í ES sum partur av Danmark. Men tað er neyvan sannlíkt, at ES hevði góðtikið fult føroyskt sjálvstýri, um Føroyar vóru í ES.

Tað segði Høgni Hoydal, uttanríkisráðharri, við útvarpið í gjár. Hetta sigur hann í kjalavørrinum á tí, sum Edmund Joensen, fólkatingsmaður, førdi fram fríggjadagin um, at ES kundi geva føroyingum eina lagaliga loysn fyri ES-limaskapi.

Edmund Joensen mælti tá til, at Føroyar skjótast gjørligt tóku upp samrøður við ES fyri at fáa tættari tilkýti til felagsskapin og lættari atgongd til stóra evropiska marknaðin.

Edmund Joensen hevði fingið at vita á fundi við Leonard Orban, sum er ES-kommiserur í fleirmálsligheit, at hann helt einki vera í vegin fyri, at ES er sinnað at finna eina smidliga loysn fyri Føroyar, sum Edmund Joensen tulkar sum eitt nú serskipan fyri fiskivinnuna, sum hevur so stóran týdning fyri búskap okkara.

Men hetta trýr Høgni Hoydal einki uppá. Hann sigur, at einki nýtt er í hasum, og at Føroyar síðani 1973 hava kunnað blivið limur í ES sum partur av Danmark – og hann trýr ikki uppá, atES hevði góðtikið føroyskt sjálvstýri, um Føroyar vóru í ES.

Edmund Joensen, fólkatingsmaður harmast um, at Høgni Hoydal sáar iva um fundin millum fólkatingsmannin og ES-kommiserin.

- Tað má sigast at vera óseriøs og arrogant framferði í mest týðandi uttanríkispolitiska spurninginum um ES-limaskap til Føroya, sigur Edmund Joensen, sum eisini spyr, um tað kann finnast ein smidlig leið fyri Føroyar inn í ES. Hann setir eisini spurningin, um tað er møguligt, at sjálvsavgerðarrætturin verður varðveittur, hóast Føroyar vinna sær ES-limaskap umvegis limalandið Danmark.

- Hesar spurningar vil landsstýrið ikki fyrihalda seg til. Eingin eftirkanning og eingin grundgeving, bert proppar í oyrunum og bind fyri eyguni, sigur Edmund Joensen, sum setir spurnartekin við ES-politikkin hjá nýggju samgonguni.

Edmund Joensen heldur ongan iva verða um, at vit sum skjótast eiga at taka upp samrøður við Evropasamveldið fyri at kanna møguleikarnar fyri tættari tilknýti til ES og betri atgongd til stóra evropiska marknaðin.

- Málið eigur at vera ES-limaskapur við undantøkum, og undirritaði er til reiðar at samstarva við landsstýrið til tess at finna røttu loysnirnar fyri Føroyar, sigur Edmund Joensen.



Hug at skapa og betra um umhvørvið?

Vit sóknast eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella starvsfólki við líknandi útbúgving ella royndum

Tú kemur at starvast mitt í býnum saman við eldhugaðum og dugnaligum starvsfelagum, ið miðvíst hugsa um umhvørvið. Okkara arbeiðsuppgávur eru fjøllbroyttar og avbjóðandi og fevna um:- Umhvørvisráðgeving- Grøna orkuveting- HVS-innlegging- Ventilatiónsskipan- Vatnveiting- Sprinklaraskipan.

Vit vænta, at tú dugir væl at arbeiða við vanligum Microsoft forritum og AutoCAD/MEP. Harumframt skalt tú duga at arbeiða sjálvstøðugt við fleiri uppgávum samstundis og hava góð samstarvsevni. Royndir innan omanfyrinevndu arbeiðsøki er ein fyrimunir, men ikki ein treyt.

Løn og setanartreytir verða avtalað í samsvar við útbúgving og royndir.

Starvið verður sett sum skjótast, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum ella kanska røttu fólkunum.

Send okkum eina umsókn við C.V. og prógvum til mel@mel.fo ella til: Martin E. Leo Sp/f , Ráðgevandi verkfrøðingar, Tórsgøta 24, 100 Tórshavn.

Martin E. Leo Sp/f · Ráðgevandi verkfrøðingar · Tórsgøta 24 · 100 Tórshavn
Tel 661488 · Fax 315488 · mel@mel.fo

Ferðavinnusamstarv millum Ísland, Grønland og Føroyar

Øll, ið hava áhuga fyri at fremja ferðavinnusamstarv londini millum, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir, vørumenning, ferðir og tílíkt. Umsóknir skulu í minsta lagi fevna um samstarv millum tvey av hesum trimum londunum.

Stuðul verður veittur til verkætlanir innan hesi øki:

**Útbúgving**
uppihald til starvsvenjing, fakligar kanningarferðir, skúlaferðir, ferðavinnuútbúgvingar og tílíkt

**Menning av 'kombinationsturisme'**
cruise, temaferðir, short break og tílíkt

**Millumlanda samstarv**
mentanartiltøk, skúlaferðir og tílíkt

**Marknaðarføring og greining av ferðavinnu**
víðkan av altjóða átøkum

Stuðul verður veittur til verkætlanir ella virksemi, sum fer fram innan árslok 2008. Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, har møguliga nærri frágreiðing og fíggjarætlan kann leggjast við. Umsóknin skal skrivast á donskum ella enskum og sendast til:
**NATA c/o SamVit**
Bryggjubakki 12
100 Tórshavn

Møguligir spurningar kunnu setast til: Per Hansen á tel. 306904 ella teldupost: per@samvit.fo

**Evstamark fyri at senda inn umsóknir er 7. mars 2008**
Leiðbeining kann fáast hjá SamVit. Umsóknarblað kann takast niður frá www.tourist.fo

NATA
North Atlantic Tourism Association